FALDARI 6

# 2016 H71 2017

## HEIMA Í HOYVÍK



FTZ DEILDIN

# H71 v KÍF

**HOYVÍKSHØLLIN** SUNNUDAGIN **26. FEBRUAR** 2017 **KL. 16.00**


Auto Service

BÓNUS er biligari!

J&K

TRYGD

INTERSPORT Thomas Dam ítróttur

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STRØND 4

LAIDERZ

SUÐUROYAR SPARIKASSI

# FULL HOUSE

## AFTUR Í ÁR HAVA VIT UPPLIVA AT H71 GJØRDI BART Í STEYPAKAPPINGINI OG STREYK AVSTAÐ VIÐ BRÓÐURPARTINUM AV GULLHEIÐURSMERKJUNUM

Av 11 møguligum vunnu vit heili 6 gullmerki. Neistin vann 2 og Kyndil, VÍF og Tjaldur hvør sítt. Vit høvdu leikt okkum til luttøku í 6 finalum og vunnu soleiðis allar. Gaman í, samanborið við í fjør, tá vit vunnu heili 8 gull heiðursmerki, hevur gingið aftur á hond, men ikki er yvir at dylja, at vit eru væl við og fyri í øllum deildum í løtuni. Tað sum nú ræður um, er at halda fast og áfram við uppbyggiliga ítróttararbeiðinum, bygdini og hondbóltinum at frama.

### FINALAN HJÁ MONNUM

Høvuðsfinala okkara, um nakað eitur so, er helst finalan í steypakappingini hjá fremsta liðið hjá monnum og hana leiktu vit ímóti StÍF leygardagin. Vit høvdu eitt tap frá steypafinaluni í 2004 við í skjáttuni at hevna, tá vit taptu 30 – 34 fyri StÍF, og kanska gjørdi júst tað sítt til at vit endaðu dystin sum sigursharrar. Annars løgdu strandingar út sum eitt óløgi og bardust frá fyrsta bríksli sum úlvar á skóg fyri at vinna dystin. Hesum høvdu vit roknað við og lótu okkum heldur ikki taka av fótum. Vit høvdu eisini munnin størsta partin av fyrra hálvleiki, tó so, at StÍF beint fyri hálvleik var á odda heili 11 – 14. Vit tóku hetta aftur í einum og kundu fara til hálvleiks við støðini 14 – 14. Fyrra part av seinra hálvleiki fór StÍF aftur frá okkum og tá annar hálvleikur var hálvrunnin, var StÍF á odda heili 16 – 19 og vóru vit tveir mans færri á vøllinum. Tað sá einki út hesa løtuna. Men so varð turboin hjá H71 so sanniliga sett til og eftir bert fáum minuttum, var støðan broytt til 22 – 19 til H71 og frá tá av, varð ongantíð spenningur aftur í dystinum. Vit fóru uppá 26 – 20 og endaðu dystin við einum sannførandi 28 – 25 sigri. Allan dystin hevði stóri spurningurin verið, hvussu longi StÍF hevði orku til at fylgja við í dystinum. StÍF hevði leikt allan dystin uttan at skifta út, so leikararnir fingu ikki neyðugar steðgir, at fáa luft og at endurvinna orku í. Seinastu 10 minuttirnar av dystinum, vóru dekkini hjá StÍF fløt og battaríini uttan løðing og uttan orku kemst ongan veg. Hetta máttu strandingar eisini sanna. At so Ári í málinum hjá H71 púra stongdi málið hesa løtuna, gjørdi bara brekkuna enn brattari.

Samanumtikið eitt sannførandi avrik av monnum okkara, ið allir sum ein stríddust hvør fyri øðrum. Og er tað altíð tað, ið „ber sigurin dagurin ytstur“ sum skaldið tók til.

### HINAR FINALURNAR

Í hinum finalunum luttóku vit í D12, D14 og D18 hjá dreingjum. Hjá gentunum luttóku vit í G14 og G17. D18 spældu leygarkvøldið og vunnu 36 – 31 á VÍF, eftir at hava havt eina rímiliga trygga leiðslu størsta partin av dystinum. D18 leika ein tryggan total-hondbólt, ið minnir nógv um spælið hjá fremsta liði.

***...framhald á síðu 4***


**Anna Dam**
forkvinna,
tel. 519082


**Bergtóra Høgnadóttir**
næstforkv., tel. 286011


**Ann-Mari B. Mouritsen**
tel. 214452


**Emy Sólvitsdóttir**
tel. 513769


**René Dahl Olesen**
tel. 235930


**Janet Fríða Johannesen**
tel. 212211


**Símun Poulsen**
tel. 517220


**Erland Jensen**
tel. 243534

**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo **FALDARI 3 2016-17**

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Bergtóra Høgnadóttir
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent



BANK**NORDIK**

# Heildar-ráðgeving, ið ger mun

Okkara mál er at veita tær ráðgeving, ið kemur allan vegin runt um tíni viðurskifti. Ráðgeving, ið er snikkað til júst tín tørv, soleiðis at tú kanst brúka tíðina til tað, ið hevur týdning fyri teg. Ráðgeving, ið veitir tær eitt gott yvirlit og gevur tær fíggjarligt rásarúm í gerandisdegnum. Við øðrum orðum; ráðgeving, ið gevur meining.

Ynskir tú ta bestu ráðgevingina?

**Bílegg fund á www.banknordik.fo/nordik360**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

SENDISTOVAN



Vit hava avgjørt tilfar at seta við í fremstu deildini komandi árið og var tað avgjørt hugaligt at staðfesta í D18 finaluni leygarkvøldið.

Finalurnar hjá børnum vóru sum vant sunnudagin. Og vit vunnu rættuliga sannførandi í trimum av teimum fýra finalunum vit luttóku í. D12 vunnu 25 – 12 á StÍF, G 14 vunnu 19 – 10 á Stjørnuni og D 14 vunnu 28 – 14 á Team Klaksvík. Eingin veruligur spenningur var í hesum finalum, til tess var munurin ov stórur. Eisini átti H71, ella neyvari H71 – familjan Ellefsen/ Mittún, dagsins leikara í øllum hesum finalum. Jana Mittún var dagsins leikari í G14, Óli Mittún dagsins leikari í D12 og Pauli Mittún dagsins leikari hjá D14. Hjartaliga tillukku við tí. Meiri spenningur var í síðstu finaluni vit luttóku í sunnukvøldið. Hetta var finalan í G17 millum Stjørnina og H71. Tað leikti hart á mesta av dystinum og fylgdust liðini upp eftir, tó so, at vit vóru nakað undan mesta av dystinum. Stjørnan legði seg framum uppundir leiklok og tá Stjørnan skoraði til 17 – 18 tá bert fá sekund vóru eftir av dystinum, væntaðu øll at Stjørnan hevði vunnið. Men Marita Mortensen vildi tað øðrvísi og við einum megnar hoppskotið setti hon bóltin í netið hjá Stjørnuni beint tá tíðin var um at vera úti og vit høvdu javnað til 18 – 18. Síðani varð leiktíðin longd við 2 x 5 minuttir og hesa longdu leiktíð vunnu vit úr H71 og kundi við einum samlaðum 26 – 23 sigri staðfesta, at vit eisini høvdu vunnið finaluna í G17.

Samanumtikið kunnu vit kanska loyva okkum at staðfesta, at H71 er um at vera kynsbúgvið hjá bæði monnum og kvinnum nú. Og her verður serliga hugsað um kvinnudeildina. Tað er ein royndur lutur, at H71 hevur haft tað trupult við at skapa eina støðuga og góða kvinnudeild í felagnum. H71 hevur soleiðis ongantíð haft lið í fremstu deildini hjá kvinnum og mugu vit bara taka í egnan barm og sanna, at tað er ov galið. Men við steypasigrunum hjá bæði G14 og G17, tykist sum at vit eru við at hava tann hóp av stinnum leikarum, ið skal til, fyri at manna eitt lið í fremstu deildini hjá kvinnum. So er bert at vóna, at stóra arbeiðið nógvar góðar kreftir hava lagt í kvinnudeildina, heldur áfram, so tað veruliga ber á mál og vit verða umboðaði í fremstu deildini hjá kvinnum eisini.


XL BYG®
TÓRSHAVN
DEWALT
TIMBURHANDIL - BYGGIMARKNAÐUR
og nú eisini
XL BYG®
HANDVERKARABÚÐ
Opið
Mán - frí 08.00 - 17.00
Leygard. 09.00 - 13.00



Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN




Tað besta ommaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!
MBM
SENDISTOVAN

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

Kaj Andreasen & Co
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum



TIT HAVA TØRVIN
VIT ERU VEITARIN.
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco

fk




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO



Dekk
- sjálvandi frá Bilrøkt!
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo




LEASA MEG
PRIVAT LEASING FRA REYNI SERVICE
TOYOTA
3
ÁRA SERVICE PAKKI
YARIS HYBRID
YARIS HYBRID
Einans 3.640,- um mánaðin!
TØRVAR IKKI LØÐING
Við Yaris all in fært tú alt við: Tá er eisini trygging, vektgjald og dekk íroknað. Allir prísir eru við mvg. Eitt stovningargjald á 20.000 kr., eitt fast mánaðargjald og nýggjan bil 3. hvørt ár. Og vit taka okkum av øllum viðlíkahaldi. Sí treytir á reyniservice.fo
REYNI SERVICE
Umhvørvisviðurkent ISO 14001 virki

vistir.fo
haraldsen



trygging.fo



# Tryggja **teg** og **tíni kæru**

Tað er týdningarmikið at tryggja teg og tíni kæru, um tú skuldi verið fyri vanlukku ella sjúku.





Ein **vanlukkutrygging** fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri. Til dømis dekkar hon ymisk sløg av tannskaðum og øðrum likamsskaðum, men tilburðurin skal vera íkomin í samband við ein vanlukkutilburð.

**Viðgerðartrygging** er góð og er galdandi alt samdøgrið, bæði tá ið tú ert til arbeiðis og tá ið tú hevur frí. Hon fevnir um pínu, sjúku og fylgjur av vanlukkum, sum krevja viðgerð av serlækna. Hon tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, soleiðis at tú sleppur undan bíðilistum.

**Set teg í samband við okkum og hoyr meira um hesar og aðrar tryggingar.**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR



©NUDLAVIRKIÐ

# Ætlar tú at selja tíni hús í Hoyvík ?

## - vit hava keyparar, ið bíða

INNI

Niels Finsensgøta 37 | Tórshavn | Tel 348 900 | inni@inni.fo | inni.fo

# H71 KLÆÐINI 2016/17



**Sweat**
Børn: 399-
Vaksin: 449,-

**Jacket**
Børn: 449,-
Vaksin: 499,-

**Pants**
Børn: 399,-
Vaksin: 449,-

H71 INTERSPORT Thomas Dam ítróttur adidas

JÓN GREGERSEN

# HVUSSU SKAPA VIT EITT ÍTRÓTTARUMHVØRVI VIÐ DYGDARGÓÐARI TALENTMENNING?

**„OFTA VERÐUR TOSAÐ UM AT TAÐ ER ÓTRÚLIGT AT NØKUR FELØG ÁR EFTIR ÁR MEGNA AT MENNA ÚRVALSÍTRÓTTARFÓLK, MEÐAN ONNUR LÍKNANDI FELØG IKKI MEGNA HETTA. TAÐ ER EYÐSÝNT AT ARVALIG GEN OG MIÐVÍS VENJING HAVA NAKAÐ AT SIGA. MEN HÓAST FLEIRI FELØG HAVA VÆLÚTBÚNAR OG MOTIVERAÐAR VENJARAR OG GÓÐAR HENTLEIKAR, SO ER VERULEIKIN TANN, AT NØKUR FELØG MEGNA BETRI ENN ONNUR FELØG AT GANGNÝTA TEIRRA TILFEINGIÐ“.**

## (1. PARTUR)

Í hesi grein fari eg at greiða frá hvat eyðkennir tey ítróttarumhvørvi, ið hava góð úrslit í at menna ung ítróttarfólk. Eitt ítróttarumhvørvi er alt tað sum er rundan um tann einstaka leikaran: liðið, felagið og skipanir rundan um felagði (t.d. familja, vinir, skúli, arbeiði, og sersamband). Eisini fari eg at greina hvussu felagsskapir, ítróttarfeløg og venjarar kunnu skapa karmar um eitt ítróttarumhvørvi, ið viðvirkar til at menna fleiri ungar leikarar og harvið gagnnýta teir stóru eginleikar, ið ofta eru til staðar.

Í 2016 fekk eg kandidatprógv í ítróttarsálarfrøði á viðurkenda Thessaly universitetinum í Grikkalandi. Meðan eg var lesandi, var eg so heppin at sleppa í starvsvenjing hjá Team Danmark. Har var eg við til tað arbeiði, ið varð gjørt fyri at fyrireika donsk ítróttarfólk til OL í Rio, á best møguligan hátt. Í Team Danmark fekk eg møguleikan at samstarva við og læra av fýra av teimum dugnaligastu danskarunum í ítróttarsálarfrøði. Nú arbeiði eg sjálvsstøðugt við ítróttarfólkum frá ymsum ítróttargreinum, og haldi fyrilestrar fyri ítróttarfeløgum í Føroyum og Danmark. Eisini havi eg eitt parttíðarstarv hjá fótbóltsfelagnum AGF í Aarhus, har eg arbeiði við at menna ungar leikarar og fyrireika teir til eitt møguligt skifti til Superligafótbólt. Tískil meti eg meg hava praktiska og ástøðiliga vitan til at skriva hesa grein.

Tað er ein sannroynd, at størri og størri dentur verður lagdur á tann sálarliga partin av ítrótti í norðurlondum. Hetta havi eg eisini upplivað í Føroyum. Fleiri og fleiri feløg og einstaklingar vísa áhuga í at fáa eitt ítróttarsálarfrøðiligt íkast, fyri at mennast og harvið økja um møguleikan at avrika á høgum støði. Tískil vóni eg at henda grein kann viðvirka til at skapa íblástur til at skapa ítróttarumhvørvi við dygdargóðari talentmenning.

***...framhald á síðu 16***

AnniJanni

FOKUS 18:29




## Ger tínar dreymar til veruleika

- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á - NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

Gjaldskort Netbanka Fígging FramtíðarKonta

Vitja deildina í Vági og Havn.

ss.fo

SUÐUROYAR SPARIKASSI

## HVAT ER TALENT?

Oftað verður tosað um at ein leikari er eitt satt „talent" ella hevur „talent". Men hvat merkir orðið talent? Og er tað yvirhøvur møguligt at staðfesta at viðkomandi er ella hevur talent?

Ein leikari í t.d. hodbóltibólti kann vera sera dugnaligur sum ungur, og tá verður oftað sagt at viðkomandi heilt vist fer at „sláa ígjøgnum" til vaksnamannahondbólt. Hetta er tó ikki altíð so. Samstundis finnast leikarar, ið fá ella eingin roknar við fara at koma langt á teirra yrkisleið, men sum allíkavæl mennast so nógv, at teir/tær seinni gerast eitt stolt dømi hjá tí felagnum, ið hevur uppalt teir/tær.

Ein orsøk til at nakrir leikarar standa seg væl á ungum árum, eru teir eginleikar, ið teir/tær arva frá teirra foreldrum. Eitt nú hava kroppsbygnaður, hædd og styrki nógv at siga á ungum árum. Hesin munur verður tó útjavnaður við tíðini. Sostatt er tann munurin, sum fyrr var avgerandi (t.d. hædd ella styrki) burtur, tá ið leikararnir eru blivnir eldri.

Sálarligir eginleikar kunnu vera ein onnur orsøk til at ávísir leikarar avrika á hægri støði sum ungir. Sjálvsálit og ágrýtni at vinna hava millum annað nógv at siga fyri teirra avrik. Hesir eginleikar kunnu tó mennast. Tískil er tað torført at spáa um hvørjir leikarar við tíðini fara at mennast mest.

## TALENTMENNING HAR DENTUR VERÐUR LAGDUR Á AT MENNA TANN EINSTAKA LEIKARAN

Tó, at tað er torført at spáa um framtíðina, tá ið tosað verður um leikaramenning, so verður dentur ofta lagdur á at brúka tíð og orku uppá at menna leikarar, ið síggja út til at hava eitt sokallað „talent". Í eini slíkari tilgongd snýr tað seg um at hesir leikarar fáa so nógvar tímar sum møguligt av miðvísari og dygdargóðari venjing, har ið dentur verður lagdur á at teir/tær ogna sær serkunnleika í eini ávísari ítrótt ella á einum ávísum plássi á vøllinum á sera ungum árum.

Fyrimunurin við at velja eina tílíka tilgongd er, at tann einstaki venjarin hevur møguleika at brúka meira tíð og orku uppá tann útvalda bólkin heldur enn heildina. Tá ið ein tíð er gingin sær venjarin at hann hevur valt rætt, av tí at teir útvaldu leikararnir hava ment seg meira enn teir leikarar, ið ikki blivu útvaldir. Men hvør veit um júst hesir leikarar hava ment seg mest av tí at teir hava størst eginleikar at mennast, ella av tí at teir hava fingið fleiri tímar av miðvísari og dygdargóðari venjing samanborið við teir leikarar, ið ikki blivu útvaldir?

Ein tílík tilgongd hevur tó eisini sínar vansar. Fyri tað fyrsta missa vit møguleikan at menna teir leikarar, sum í framtíðini annars høvdu haft møguleika at víst sínar dygdir. Og av tí at Føroyar hava eina avmarkaða nøgd av leikarum at velja ímillum, kann tað gerast ein sera „dýr" loysn at satsa uppá nakrar leikarar grundað á hvussu væl teir avrika í dag.

Eitt nú vísur nýggj donsk gransking, at tey ítróttarfólk, ið eru lutfallsliga eldri, tá ið tey byrja at økja mongdina av miðvísari venijng, fáa færri skaðar, hava størri motivasjón, og náa longri á teirra yrkisleið, samanborið við tey ítróttarfólk, ið á lutfallsliga yngri árum byrja at økja um mongdina av miðvísari venjing í eini ávísari ítrótt.

Ein annar vansi er tann, at teir leikarar, ið vera útvaldir, til tíðir uppliva at bæði foreldur og venjarar hava sera stórar vónir um at hesir leikarar fara at „sláa ígjøgnum". Stórar vónir frá foreldrum og venjarum eru ofta við til at økja trýstið hjá tí einstaka leikaranum. Tískil eru hesir leikarar í vanda fyri at uppliva ein ótta fyri ikki at liva upp til hesar vónir hjá øðrum. Hetta kann føra við sær minni gleði við at íðka, eins og tað kann hava negativa ávirkan á avrik.

Samanumtikið kann sigast at tað er sera torført at spáa um framtíðina, tá ið tosað verður um talentmenning. Av hesi orsøk er gransking í ítróttarsálarfrøði byrjað at flyta fokus frá hvørjar dygdir eyðkenna teir leikarar, ið ofta koma langt í eini ávísari ítrótt, til at kanna hvørji sereyðkenni gera seg galdandi í einum ítróttarumhvørvi, ið lutfallsliga ofta eydnast at menna úrvalsítróttarfólk.

*...framhald á síðu 25*

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



Vit hava deilt vinningin millum
allar kundar okkara í 50 ár
– og tí halda vit fram við

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

SENDISTOVAN

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI



# Góðir starvsfelagar skapa góð úrslit

"Eg eri vísur í, at tað er góði starvsandin, sum skapar góðu úrslitini hjá Marine Harvest"

*Fjalar, alari í Oyndarfirði*

Marine Harvest strembar eftir at skapa bestu liviumstøður fyri laksin. Vit tryggja okkum, at laksurin er heilsugóður matur. Vit arbeiða í góðum samljóði við umhvørvið og við ábyrgd fyri samfelagnum. Marine Harvest vil vísa vegin til alsamt størri burðardygd.

LAIDERZ

*Better in the long run*






VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI
Alt til
HITA
SANITET &
VENTILATIÓN
Maria Poulsen & Co
Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000


ww.kondi.dk
FAXE
KONDI
MED DRUESUKKER


Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Myklnesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909



...bert hugflogið
setur mørk!

OKKARA NÝGGJA SKERIMASKINA

# HUGSA STÓRT

Við nýggju skerimaskinu okkara kunnu vit nú bjóða hesa slóðbrótandi framleiðslu í Føroyum.
Útskorin skelti, stavir, samansetingar og standarar úr flest øllum tilfari og tjúgdum.

**Ja, nú ber veruliga ALT til – Hugsa stórt, hugsa Føroyaprent!**

Ring tel. 314555 og hoyr nærri
www.foroyaprent.fo

Føroyaprent



www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Eik

## TALENTMENNING HAR DENTUR VERÐUR LAGDUR Á ÍTRÓTTARUMHVØRVI

Kristoffer Henriksen, ið bæði starvast hjá Team Danmark og granskar í ítróttarsálarfrøði, hevur gjørt eina kanning við tí fyri eyga, at finna tey sereyðkenni, ið eru galdandi fyri ítróttarumhvørvi, ið ár eftir ár megna at menna úrvalsítróttarfólk. Eitt nú vitjaði hann eitt norskt kajakfelag, har 16 av 40 kajakrógvarum hava umboðað tað norska landsliðið í kajak! Í slíkum feløgum, sum megna at menna ein sera stóran part av úrvalsítróttarfólki, eru nøkur sereyðkenni ið stinga fram. Tað er við støði í hesi kanning at eg fari at greina hvørji eyðkennir gera seg galdandi fyri dygdargóð ítróttarumhvørvi.

Eitt ítróttarumhvørvi umfevnir heildina, ið leikarin er partur av: liðið, felagið og skipanir rundan um felagði (t.d. familja, vinir, arbeiði, skúli og sersamband). Tað hevur sera stóran týdning at teir ymisku partarnir í hesi heild megna at arbeiða saman, soleiðis at tann einstaki leikarin fær eina kenslu av, at tey sum eru rundan um hann hava somu áhugamál. Um t.d. foreldrini siga eitt („tað er týdningarmikið at vinna") og venjarin eitt annað („tað er ikki so týdningarmikið at vinna, men tað er meira týdningarmikið at mennast"), so kann leikarin fáa eina kenslu av ráðaloysi. Leikarin kann eisini gerast ráðaleysur, um felagið ynskir eitt (t.d. venjingarlegu) og skúlin eitt annað (t.d. onga fráveru). Tískil hevur tað alstóran týdning at hesir partar rundan um leikaran megna at arbeiða saman, um vit ynskja at skapa eitt umhvørvi við dygdargóðari talentmenning.

Við støði í kanningini hjá Kristoffer Henriksen, havi eg valt at varpa ljós á tey sereyðkenni, ið eg meti hava stóran týdning fyri føroyska talentmenning:

1. At pláss er fyri øllum og at dentur verður lagdur á trivna og persónliga menning
2. At býta vitan
3. At skapa langtíðar menning heldur enn fyribils úrslit
4. At vera tilvitaður um hvørja mentan felagið byggir menning av leikarum á

## AT PLÁSS ER FYRI ØLLUM OG AT DENTUR VERÐUR LAGDUR Á TRIVNA OG PERSÓNLIGA MENNING

Fyri tað fyrsta vísti kanningin hjá Kristoffer Henriksen, at tá ið skipað verður fyri venjing fyri børnum og ungum, so er tað umráðandi at dentur verður lagdur á at venjingin er fyri øll, óansæð førleikastøði. Somuleiðis er tað týdningarmikið, at dentur verður lagdur á at venja grundleggjandi førleikar, sum í hondbólti t.d. kunnu vera at renna, hoppa, kasta, skjóta og dribla við bóltinum. Tað mótsætta av hesum er at býta leikarar upp í bólkar eftir førleika, og síðan skipa fyri miðvísari venjing við tí í huga at menna ávísar førleikar til ávís pláss á vøllinum.

Eisini vísur tað seg at ítróttarfólk sum koma longst, á ungum árum ofta íðka aðrar ítróttargreinar sum lið í teirra venjing. Umframt at tað er stuttligt at royna aðrar ítróttargreinar, kann ein størri breidd av kroppsligum førleikum vera ein stórur fyrimunur og viðvirka til enn betri avrik.

Harumframt vísti kanningin hjá Kristoffer Henriksen, at teir íðkarar, ið ofta koma langt, hava atgongd til møguligar hentleikar hjá felagnum áðrenn og eftir venjing. Hetta gevur møguleika at nýta ítróttina til spæl og til at venja eyka, um ein hevur áhuga í tí.

*2. partur av greinini verður í komandi H71-leikskrá*



# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN

## ANNA Á STEIG

G17 OG 1. DEILD KVINNUR
(17 ÁR)



**Hvørjum plássi spælur tú á?**
– Bakkinum.

**Hvør á liðnum hjá tær er stórsta drama-queenin?**
– Tað man nokk vera venjarin Sonni

**Hevur vánaligasta tónleikasmag?**
– Katrin Vang Højsted.

**Hevur flottastu reyv?**
– Durita Toftum Joensen ger tað gott.

**Er festligast at vera í brúsu saman við?**
– Katrin Vang Højsted.

**Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?**
– Eg veit ikki.

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
– Nei.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
– At vinna steypafinaula eftir umdyst ímóti stjørnuni leygardagin.

**Hvør er besti leikari, ið tú hevur spælt ímóti?**
– Turið Arge Samuelsen.

**Hvat fyri skoritriks hevur riggað best hjá tær?**
– Eg fekk sjeikin hjá mær tá eg var 14 ár, og tá var skoritriksi at gera krákufót. Tað riggaði avbera væl.

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbóltssøgu at fortelja?**
– Tað er millum meg og liðfelagarnar.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
– Sjálvandi samanhaldi, fólkini og bara Hoyvíkin generelt.

**Hvønn skal eg spyrja næst?**
– Maritu Mortensen.


HANDLA
Ein heimur fyri seg av
tilfari til skapandi sálir
01
GLOSSY
www.handla.fo

SAMRØÐA VIÐ SONNI LARSEN,
*venjara hjá H71 um garudaamboðið*

# LITRÍKIR GARUDAMENN

**FYRI JÓL VAR Í FALDARA OKKARA GREITT FRÁ AMBOÐNUM GARUDA, SUM ALLIR MANSLEIKARAR FELAGSINS HAVA HAVT GLEÐI OG GAGN AV AT ROYNA. Í SAMRØÐUNI NIÐANFYRI GREIÐIR SONNI LARSEN FRÁ, HVUSSU HANN GAGNNÝTIR HETTA AMBOÐIÐ SUM VENJARI HJÁ BESTA MANSLIÐI OKKARA**

Hvussu gongur tað fyri seg við slíkari test? Leikarin svarar 64 spurningum, sum allir snúgva seg um teg, tá tú spælir hondbólt. Tað tekur á leið 20 minuttir at svara. Svarini gera so bæði ein tekst og ein graf, sum lýsir leikaran sum hondbóltsspælara.

Síðani tosi eg við leikaran um úrslitið – hvørjar eru styrkirnar hjá leikarnum og hvar kann leikarin mennast. Garuda deilir fólk upp í litir: grønt,reytt, grátt og blátt. Flestu okkara hava serliga tveir litir sum eyðkenna okkum.

Er nakar litur betri enn ein annar? Nei – allir litir hava sínar styrkir og allir hava sama virði. Perfekta toymið er liðið, har allir litir eru vælumboðaðir.

Hvat gerst tú, um onkur litur er ov lítið umboðaður á liðnum? So supplera vit venjarar við tí litinum, sum restar í. Vit eru tilvitaðir um at hugsa øðrvísi loysnir. Eisini tosa vit longu undan dystinum um, hvussu leikarin kann handfara onkrar ávísar støður á vøllinum.

Vit hjálpa eisini leikaranum at reflektera um egnu positipon og atferð. Tankin er menning. Í spælinum gera vit leikararnar tilvitaðar um at finna loysnir. Eisini loysnir teir ikki hava roynt áður. Hjálp til sjálvhjálp er amboðið. Sera nøktandi sum venjari.

Hví Garuda? Tað snýr seg um at menna leikararnar. Kann gerast á nógvar hættir – Garuda er ein møguleiki, har arbeitt verður við leikarunum mentalt – eisini teir heilt ungu leikararnir kunnu hava gagn av hesum amboðnum.

Tað skal eisini vera stuttligt at gagnnýta – bæði hjá leikarunum og hjá mær. Á vøllinum kunnu vit á ymsar hættir gera spøl. Spøl, har litirnir gerast sjónligari og vit øll kunnu læra ein hóp og í tí stuttliga gerast enn meiri tilvitaði.

Hvussu ungir leikarar kunnu hava gagn av hesum? Teir skulu vera um 18 ár. Tástani er menskan búgvin til tess.

Kann eitt slíkt amboð ikki seta leikararnar í bás? Jú, tað kann vera ein vandi – hinvegin, til tess at gagnnýta amboðið, so skalt tú verða sertifiseraður til tess. Og tá lærir tú bæði, hvussu tú eigur at nýta amboðið og eisini, hvussu tað ikki eigur at vera nýtt.

***...framhald á síðu 37***

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.

Fríða Patursson, adv.

Óla Jákup Kristoffersen, adv.

Christian Andreasen, adv.

Niels Winther Poulsen, adv.

Eyðbjørn Larsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN

TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!




NORÐOYA SPARIKASSI

Orkulán 2,5%

- Bústaðarlán við lágari rentu

**Bílegg eitt kundaprát**
*og fá meira at vita um fyrimunirnar við orkuláninum*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com

Hvat er góður etikkur og siðvenja. Eg gagnnýti amboðið bæði so eg sjálvur gerist tilvitaður um, hvussu hin einstaki leikarin verður mentur á skilabesta hátt – og eg hjálpi leikaranum at fáa betri innlit í styrkir sínar.

Kann ein broyta lit? Í ein ávísan mun ja – skilt á tann hátt, at til ber at broyta atferð – men ikki mensku. Um eg eitt nú gerist tilvitaður um, at ein ávísur háttur at handfara eina støðu ikki tænir einum endamáli, so ber til lættari og skilabetri at broyta atferð mína til eina aðru ferð. Eisini hóast tað ikki tykist mær heilt nattúrligt.

Sær tú nakra broyting á liðnum eftir at menn eru testaðir? Ja, eg havi varhugan av, at tilvitanin fyri spælinum er broytt. Seinastu dystirnar hava vit vunnið við einum máli – eg haldi, at vit megna betri nú enn áður at finna aðrar loysnir, tá vit eru allarmest sperdir. Bæði venjarar og leikarar.

Ger hetta amboðið teg til ein betri venjara? Avgjørt. Sum venjari kenni eg leikararnar væl betri nú enn áður – leikararnir læra meg betri at kenna og eg teir. Eg verði ein betri venjari av hesum – og hetta er eitt virðismikið amboð. Tá eg kenni profilarnar – so veit eg væl, hví leikarar gera, sum teir gera.

Leikarar koma til eina samrøðu, tá teir hava svarað testini. Hevur samrøðan týdning? Har eru reflektionirnar – vit fáa sett orð og tankar á mangt og hvat. Og vit fáa eina enn betri professionella relatión. Heilt grundleggjandi læri eg umvegis samrøðuna leikaran betri at kenna.

Átti hetta at blivið gagnnýtt innan aðrar ítróttargreinar? Eg haldi, at aðrar ítróttargreinar og arbeiðspláss kunnu hava gagn av hesum. Eg haldi, at hin mentali parturin er ov lítið umboðaður í ítróttarverðini. Tí mentali parturin hevur stóran týdning í mun til avrikið. Mentali parturin skapar relatiónir og lærir okkum eisini nógv um hugburð og virðir. At vera eldhugaði, djørv og herja á. Men eisini at vit eru saman um avrikið og hjálpast at.

# HVAT EYÐKENNIR YMSU GARUDA-LITIRNAR?

**REYTT:**

*Reyði leikarin er úrslitsskaparin. Hann ger alt hann er mentur og stundum meir afturat fyri at skora. Kapping og úrslit, eyðkenna hendan leikara.*

**GRØNT:**

*Grøni leikarin er kreativur. Eggjast av og dugir væl at finna nýggjar, øðrvísi og alternativar loysnir.*

**GRÁTT:**

*Grái leikarin heldur avtalur, er sera væl skipaður og tú veitst akkurát, hvar tú hevur hann.*

**BLÁTT:**

*Blái leikarin er sosialur. Hann kýtir seg, so øll hava tað gott saman og samanhaldið er gott.*

## H71

1 Ári E. **Dam**
16 Jens **á Skipagøtu**

3 Hjalte **Bachmann**
4 Rúni **Vest Højgaard**
5 Bogi **Gaard Davidsen**
8 Pætur **Thomsen**
10 Vilhelm **Poulsen**
11 Hans Kári **Hansen**
14 Sigmundur **H. Dahl**
15 Sigmundur **Nolsøe**
18 Andor **Sivertsen**
22 Helgi **Hoydal**
23 Hilmar Leon **Jakobsen**
45 Peter **Krogh**
73 Dánjal **Tórgarð**
89 Jónas **G. Djurhuus**
99 Tróndur **Arge**

**Venjari:** Sonni D. V. Larsen
**Hjálparvenjari:** Mark Lausen-Marcher
**Málmansvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Styrkivenjari:** Heri Ziska
**Liðleiðari:** Petur Sivertsen
**Fysioterapeutur:** Bartal Dahl Andreassen

## KÍF

1 Emil **Dam**
37 Marcus **Mølbjerg Jørgensen**

2 Andrias **Nielsen**
13 Tony **Weyhe**
17 Teitur **Joensen**
18 Jákup **Trygvason**
19 Hjalti **H. Matras**
24 Vilhelm **Magnussen**
25 Frederik **Sørensen**
27 Hans Eli **Sigurbjørnsson**
29 Rógvi **Weyhe**
33 Fríði **Weyhe**
34 Rúni **Joensen**
39 Ási **Dam**

**Venjari:** Jeppe Borch
Eddie H. Joensen
Zeljko Jotic
Magnus D. Jacobsen

## Dystaryvirlit hjá H71 í FTZ-deildini:

| | | |
|---|---|---|
| 18.09.2016 | **H71** - Team Klaksvík | **36**-19 |
| 21.09.2016 | StÍF - **H71** | 23-**36** |
| 25.09.2016 | **H71** - Kyndil | **26**-19 |
| 06.10.2016 | Neistin - **H71** | 26-**23** |
| 08.10.2016 | KÍF - **H71** | 29-**23** |
| 16.10.2016 | **H71** - VÍF | **28**-17 |
| 23.10.2016 | Kyndil - H71 | 21-**29** |
| 26.10.2016 | Team Klaksvík - **H71** | 22-**29** |
| 30.10.2016 | **H71** - StÍF | **25**-25 |
| 09.11.2016 | **H71** - KÍF | **23**-22 |
| 13.11.2016 | **H71** - Neistin | **22**-20 |
| 27.11.2016 | **H71** - Kyndil | **24**-23 |
| 11.12.2016 | VÍF - **H71** | 27-**29** |
| 14.12.2016 | **H71** - Team Klaksvík | **35**-16 |
| 17.12.2016 | StÍF - **H71** | 21-**24** |
| 26.02.2017 | **H71** - KÍF | - |
| 01.03.2017 | VÍF - **H71** | - |
| 08.03.2017 | Team Klaksvík - **H71** | - |
| 12.03.2017 | **H71** - StÍF | - |
| 19.03.2017 | **H71** - Neistin | - |
| 25.03.2017 | Kyndil - **H71** | - |
| 01.04.2017 | Neistin - **H71** | - |
| 09.04.2017 | **H71** - VÍF | - |
| 15.04.2017 | KÍF - **H71** | - |

## Støðan í FTZ-deildini:

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **H71** | **15** | **412** | **330** | **82** | **25** |
| 2 | VÍF | 15 | 465 | 385 | 80 | 21 |
| 3 | KÍF | 15 | 384 | 363 | 21 | 19 |
| 4 | Kyndil | 16 | 416 | 394 | 22 | 18 |
| 5 | Neistin | 15 | 372 | 389 | -17 | 14 |
| 6 | StÍF | 16 | 433 | 448 | -15 | 10 |
| 7 | Team Klaksvík | 16 | 333 | 506 | -173 | 1 |

J&K

# ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



J&K

## J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · JULIANNA KLETT